Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri:

# Nú ríða vit á aldutindinum



*Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri*

19,8 milliónir í reiðum peningi lógu eftir á kistubotninum hjá Norðoyar Sparikassa í fjør og bjartskygni er yvir vinnulívinum í Klaksvík. Allastaðni í býnum er stórt virksemi og við bryggjukant verða dagliga millíónavirði løgd upp á land.

- Eg haldi tó, at vit ríða á aldutindinum nú. Hetta kann ikki blíva við. Árið í fjør var ein sonn gáva til fiskivinnuna í Klaksvík. Norðoyar Sparikassi er tann fyrsti peningastovnurin í landinum til at merkja, tá tað gongur gott í fiskivinnuni, men sannliga eisini, tá tað gongur illa, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoyar Sparikassa.

- Hóast prísurin er nakað lægri í ár í mun til í fjør, so hevur ligið stak væl fyri við fiskiskapinum og úrtøkan man vera tann sama sum í fjør og vinna klaksvíkingar penging, so vinnir bankin eisini. Tað eru útróðrarbátar har manningarparturin longu nú liggur uppi á 150.000 krónur og hetta var tað sama sum teir vunnu fyri eitt heilt ár í fyrru helvt av nítiárunum, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Og tað er eitt flott úrslit sparikassin kann vísa á í ár. Úrslitið er undan skatti er 24,1 milliónir krónum og eftir skatt 19,8 milliónir krónur. Hetta eru 25 prosent meira enn í fjør. Hetta er fjórða árið á rað, at sparikassin setir egið met tann rætta vegin.

### Endurnýggja flotan

Eyðfinn Reyðberg sigur, at tað hevur gingið so gott seinastu árini hjá fiskivinnuni í Klaksvík, at vinnan hevur fingið dirvi at endurnýggja flotan. Sparikassin er við í fýra nýbygningum, sum hava heimstað í økinum, har Norðoyar Sparikassi virkar.

- Ikki færri enn fýra trolbátar til landleiðina verða bygdir í løtuni til okkara økið, og teir liggja frá 6-10 milliónir hvør. Bátarnir verða bygdir í Íslandi. Tveir skulu til Leivvíkar, ein til Haraldsunds og ein til Viðareiðis. Eg rokni eisini við, at eigararnir á teim allarbestu útróðrarbátunum fara at umhugsa at byggja nýggjar stálútróðrarbátar um eini tvey ár. Gongdin hjá hesum bátum hevur verið so góð seinastu árini, at teir eru førir fyri tíð og er tað nakað partur av fiskiflotanum, sum treingir til endurnýggjan, so er tað júst teir størru útróðrarbátarnir, sigur Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri.

- Vit rokna árið 1994 sum ár null, tá vit fóru upp í vinnulívið. Vit hava í dag nógvar vinnuligar kundar og rokna eisini við at fáa fleiri í framtíðini.




## Tølini tala hjá Norðoyar Sparikassa

TÍÐINDASKRIV

Netto rentuinntøkurnar øktust úr 44,9 mió.kr. til 49,2 mió.kr. Vøksturin stavar frá, at sparikassin hevur havt betri gjaldføri, og hevur økt um lánsbrævagoymsluna.

Kostnaðarinntøkurnar eru øktar eitt lítið vet í 2001. Tað tykist sum alsamt fleiri velja at gjalda afturvendandi gjøld sum fasta flyting, ið samstundis er ókeypis og tessvegna økjast hesar inntøkur bert smávegis.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru sostatt 51,6 mió.kr. í 2001 móti 46,8 mió.kr. í 2000, ein vøkstur uppá 4,8 mió.kr. svarandi til 10,1 %.

Sparikassin hevði aftur í 2001 ein vinning av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra, og var hesin 2,3 mió.kr., ið er eitt vet meiri enn í 2000, tá hann var 1,9 mió.kr. Skakandi hendingin í USA 11. september hevði við sær, at tjóðbankar kring allan heimin lækkaðu renturnar í heyst, og gav hetta ein kursvinning av lánsbrøvum.

Í 2001 hevði sparikassin ætlanir um at gera íløgur í partabrøv, men valdi at bíða. Hetta var heppið, tá partabrævamarknaðurin í fjør fall munandi í virði. Sparikassin hevur enn ikki avgjørt, nær hann skal gera íløgur í partabrøv.

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur øktust við 1,8 mió.kr. úr 23,5 í 2000 upp í 25,3 mió.kr. í 2001, sum svarar til ein vøkstur upp á 7,6%. Vøksturin stavar frá, at sparikassin hevði fleiri serlig átøk, harav hitt størsta var nýggja Silvakontoin til børn.

Netto avskrivingar og burturleggingar av útlánum vóru 4,2 mió.kr. í 2001 móti 5,6 mió.kr. í 2000. Sparikassin merkir, at tíðirnar í dag eru góðar, og at mong hava tað meiri rúmsátt fíggjarliga.

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er sera gott. Við árslok var gjaldførið 330 mió.kr. móti 289 mió.kr. í 2000. Hetta er 127% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans - lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans er hetta 38%. Lógin krevur her 10%. Solvensur sparikassans er framvegis góður, 32,5% móti 31% í bæði 2000 og 1999. Her krevur lógin 8%.

Á aðalfundinum fríggjakvøldið, stóðu tveir nevndarlimir fyri vali. Hesir vóru Óli Marner Christiansen og Finn Kjølbro, ið báðir vóru afturvaldir.

Nevndin skipaði seg eftir fundin við Óla Marneri Christiansen sum formanni og Finni Kjølbro sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru Jógvan Joensen, Álvur Klakk, Páll Klettskarð, Erling Petersen, Kristian Martin Eliasen, Elmar Poulsen og Sigrun Skálagarð

## Reklamuskelti brotin

**Herverk er framt á trettan reklamuskelti, ið eru á stóra skýlinum í Havn. Fleiri onnur smærri herverk eru eisini framd í Havn um vikuskiftið**

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Aftur hetta vikuskiftið hevur løgreglan fingið fleiri fráboðanir um herverk í Gundadali, eftir at konsert hevur verið har um vikuskiftið. Heili trettan reklamuskelti á stóra skýlinum í Gundadali hava fingið skaða. Tilsamans liggja eini tjúgu metrar av skeltum við vøllin. Løgreglan sigur, at slík skelti kosta 500 krónur fyri meturin. Harumframt er herverk framt á ein bil, ið stóð parkeraður nærhendis.

Fleiri onnur herverk eru eisini meldað til løgregluna. Eitt nú kann nevnast, at ein stórur steinur varð tveittur í stóra sýnisgluggan í Samvinnufelagnum á Bryggjubakka. Felags fyri øll herverkini er, at løgreglan ikki veit, hvørjir gerningsmenninir eru.

Annars verður sagt frá einum sera friðarligum vikuskifti kring landið.



# Óli Holm tekur seg úr politikki

**– Eg havi ongantíð havt serligar ætlanir um at gerast politikari, og tað er langt síðani, at eg gjørdi av, at eg fór ikki at stilla upp til løgtingsvalið, sigur Óli Holm, landsstýrismaður**

LØGTINGSVAL
*Áki Bertholdsen*

Nú teir politisku flokkarnir so smátt eru farnir at leggja seinastu hond á valevnislistarnar til løgtingsvalið í apríl, er tað í hvussu so er greitt, at ein av landsstýrismonnunum ikki verður at síggja í løgtinginum eftir valið.

Tað er Óli Holm í Vági, sum er landsstýrismaður í mentamálum fyri tjóðveldisflokkin.

Suðuroyar Tjóðveldisfelag gjørdi sín lista til løgtingsvalið lidnan sunnukvøldið og Óli Holm er ikki á listanum yvir tey sjey valevnini, sum skulu royna at endurvinna tjóðveldinum umboð í Løgtinginum næsta valskeið.

Upprunaliga var Óli Holm skotin upp at vera valevni, men hann tók ikki av.

–Tað er langt síðani, at eg tók avgerð um, at eg ikki skuldi stilla upp til løgtingsvalið, sigur hann.

Hann sigur, at í Suðuroynni hevur tjóðveldisflokkurin tað skipan, at tvey valevni skuldi finnast í Vági.

– Og tá ið so bæði valevnini, sum stillaðu upp seinast, eisini høvdu hug at stilla upp aftur hesuferð, dugi eg ikki at síggja nakra sum helst orsøk til broyta tað, sigur Óli Holm.

Tey bæði valevnini eru Hergeir Nielsen, løgtingsmaður og Jógvan Krosslá, borgarstjóri.

### Ongin treyt

Annars vóru tað mong sum mettu, at tá ið Óli Holm varð landsstýrismaður í mentamálum, var tað við tí fyri eyga, at hann skuldi halda fram í politikki og at landsstýrissessurin mest at rokna sum ein fyrireiking til at hann eisini skuldi stilla til løgtingsvalið. Tað er nevniliga ikki ókent, at ein av orsøkunum, sum viga, tá ið flokkar velja sær ávís fólk í Landsstýrinum, er júst, at í Landsstýrinum skulu tey fáa høvi at styrkja støðu sína til eitt komandi løgtingsval.

Men so er ikki í hesum føri, sigur Óli Holm.

– Tá ið flokkurin heitti á meg um at gerast landsstýrismaður, var onki tosað um løgtingsval. Tað var ongin treyt frá flokkinum um, at eg skuldi stilla upp til løgtingsval. Og tá ið eg tók av, var tað ongantíð við tí fyri eyga at eg skuldi halda fram í politikki.

Óli Holm leggur afturat, at tá ið hann heldur ikki havt serstakan hug til at koma upp í politikk, var avgerðin um ikki at stilla upp, ikki tann truplasta, hann hevur tikið.



*Tað er langt síðani at Óli Holm, landsstýriusmaðurtók avgerð um, at hann fór ikki at stilla upp til løgtingsvalið í apríl Og tað er ikki truplasta avgerð, hann hevur tikið*

Tá ið Óli Holm ikki hevur serstakan áhuga fyri at gerast politikari, er tað ikki tí, at hann ikki hevur áhuga fyri politikki annars, tí tað hevur hann. Men tað eru nógvir mátar at útinna politikk uppá og Óli Holm hevur hevur arbeitt innanfloks í tjóðveldisflokkinum í eini 10 ár í aðalstjórn floksins og hevur tí verið tætt uppat, og kennir tt í til politiskt arbeiði innan í frá.

Óli Holm fær sostatt ikki meiri enn snøgt sagt eitt ár í landspolitikki.

Men at umsita mentamál hevur verið eitt spennandi starv við stórum avbjóðingum. Hann sigur, at størsta málið, sum er avgreitt í hansara stjórnartíð, var, at útbúgvingarverkið var yvirtikið.

– Tíverri eydnaðist ikki at yvirtaka fólkakirkjuna í hesum umfari, men tað arbeiðið heldur fram. Samstundis er skjøtil settur á arbeiðið at gera eina nýggja læraraútbúgving, so at hon verður ein hægri útbúgving á BA-støði. Hesi bæði málini verða tvær stórar avbjóðingar hjá næsta landsstýrismanninum í mentamálum.

– Tíverrið eydnaðist heldur ikki at loysa trætuna um skúlan í Trøllanesi, men í tí málinum er landsstýrismaðurin í teirri støðu, at hann hevur heilt einfalt ikki heimild at skera ígjøgnum, tí hetta er eitt mál, ið liggur hjá kommununum.

### Aftur í skúla

Eftir summarfítíðina fer Óli Holm sostatt aftur í borgarliga starv sítt, sum er at vera varaskúlastjóri í Vági.

Men hevði hann so sagt, um tjóðveldisflokkurin einaferð enn heitti á hann um at taka við landsstýrissessi.

– Skuldi tað hent, at flokkurin heitir á meg einaferð afturat, fari eg sjálvsagt at umhugsa tað, sigur Óli Holm.

## Ætla at semjast um eitt felag

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

Tey bæði kommunufeløgini, sum eru Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya, eru nú farin undir at skipa eitt felags arbeiðsgevarafelag.

Í løtuni hava tey bæði feløgini hvør sítt arbeiðsgevarafelag og tað verður mett at vera sera óheppið, tá ið samráðingar um kommunal mál eru fyri.

Og sum fleiri og fleiri málsøki verða løgd út til kommunurnar, er ikki annnað væntandi, enn at kommunurnar verða størri og størri partur av arbeiðsmarknaðinum og tí ræður um hjá teimum at vera væl skipaðar.

Higartil hevur Føroya Kommunufelag havt eitt arbeiðsgevarafelag, ið nevnist Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunusamskipan Føroya hevur havt eitt felag, ið nevnist. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Men nú hevur verið arbeitt við eitt stovna eitt felag, ið skal umfata allar kommunurnar.

Ein bólkur við umboðum fyri Kommunufelagið og kommunusamskipanini hevur arbeitt í eina tíð við málinum og nú er eitt uppskot til reglugerð send kommununum til góðkenningar.

Samstundis skal ásetast, hvussu útreiðslurnar til felagið skuldi býtast, og tað verður so, at hvør kommuna betalir áleið eftir fólkatalinum.

Eftir ætlanini skal nýggja felagið eita KAF, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Kommufelagið og Kommunusamskipan Føroya skulu so velja hvør síni umboð í nevndina í KAF, men hvussu býtið verður, er ikki endaliga greitt.

Bæði kommunufeløgini hava áður samráðst saman, men nú verður samstarvið sostatt formliga skipað.

## Tjóðveldið í Suðuroy til reiðar

SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*

Tjóðveldisflokkurin í Suðuroy er liðugur við uppstillingina til løgtingsvalið í apríl. Á listanum eru sjey valevni. Tey, sum fara at stilla upp fyri tjóðveldisflokkin í Suðuroy, eru:

Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur, Klaksvík
Maibritt í Hørg, húsmóður, Sumba
Jógvan Krosslá, borgarstjóri, Vágur
Martin í Nesi, málarameistari, Hvalba
Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, Vágur
Rúni Nielsen, sølumaður, Tvøroyri
Ólavur Rasmussen, prestur, Tvøroyri

Lesarin hevur ivaleyst lagt til merkis, at Óli Holm, landsstýrismaður tjóðveldisfloksins í mentamálum, er ikki á listanum, hóast hann er vágbingur. Tað hava vit tosað við landsstýrismannin við aðrastaðni her á síðuni. Vert er eisini at leggja til merkis, at tað eina valevni, Gestur Hovgaard, býr í Klaksvík, men hann hevur røtur í Suðuroy, tí hann er hovbingar.

Av hesum valevnunum, eru tey trý nýggj á listanum, tí hvørki Gestur Hovgaard, Martin í Nesi, ella Rúni Nielsen, hava stillað upp áður.

# Ætla at keypa alla mølina

**Vágs Býráð ætlar at fáa avtalu í lag við hagarnar um at keypa alla mølina á norðara armi**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Vágs Býráð fer nú at taka upp samráðingar við hagarnar í býnum um at keypa mølina.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri, sigur,at endamálið er at keypa alla mølina framvið øllum Vágs Firði, heilt frá Marknoyri, uttast í bygdini norðanfyri, líka suður í Ónavík í Lopra á syðra armirnum á fjørðinum.

Hetta er í veruleikanum eitt stórmál, tí talan er um nógvar hagar.

Annars er støðan tann, at hvørja ferð, kommunan skal byggja út niðri við sjóvarmálum, er tað neyðugt at taka upp samráðinar við hagarnar um gjald fyri tann partin av mølini, ið byggingin fevnir um. Hetta førir nógv roks við sær, bæði fyri hagarnar og fyri kommunurnar

Mølin, sum her er talan um, er tann mølin, sum er munurin ímillum flóð og fjørðu, og tað er tí ymiskt, hvussu nógv talan er um, alt eftir, hvar í mølini, tú ert staddur, summastaðni er at kanna ongin munur, men har sandstrond er, er munurin heldur størri.

Hagarnir hava fyrrvenst sær til kommuna fyri at fáa eina heildaravtalu um fjørðina.



*Vágs Býráð ætlar nú at keypa alla mølina framvið Vágs Firði*

Á býráðsfundi herfyri samtykti Vágs Býráð at taka upp samráðingar við hagarnar um at keypa mølina. Býráið hugsar sær at semjast við hagarnar um ein samlaðan prís, sum so verður avdrigin yvir eini 10 ár.

Hetta fer at bera í sær, at hvørja ferð, kommunan skal byggja út, verður tað óneyðugt at samráðast um tann partin av fjørðini, sum byggingin fevnir um.